## Myndaframsýning

Leygardagin 31. mars kl. 16 skipar Miðvágs Fornminnafelag fyri einari áhugaverdari myndaframsýning í Bygdarhúsinum í Miðvági, har fólk fáa høvi at síggja myndir, sum Mikkjal á Ryggi hevur tikið. Øll kenna Mikkjal á Ryggi sum skald, men framsýningin vísir, at hann var eisini dugnaligur myndamaður. Á framsýningini verða umleið 200 myndir, og í sambandi við framsýningina fer Havnarkórið at syngja nakrar sangir hjá Mikkjali á Ryggi.

## Kirkjukonsertir

Leygardagin 24. mars fer kvinnukórið Suð at hava tvær kirkjukonsertir. Tann fyrra verður í Fríðrikskirkjuni á Toftum kl. 17 og tann seinna í Christianskirkjuni í Klaksvík kl. 20. Konsertirnar vara umleið ein tíma. Á skránni eru kendir sálmar og stutt klassisk stykki við solosangi so sum ”Panis Angelicus” og ”Pie Jesu” hjá Andrew Lloyd Webber. Suð er úr Klaksvík, og tað er Steinvør Fonn, sum stjórnar kórinum, ið er fimm ára gamalt.

# 200 fólk missa arbeiðið í Nærabergi

**Partafelagið Næraberg hevur gjørt av at gevast við fiskiskapinum hjá Atlantic Navigator undir føroyskum flaggi. Reiðarin gevur politisku myndugleikunum høvuðsábyrgdina av, at 200 fólk nú missa arbeiðið**

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Minni enn tvey ár eftir, at risatrolarin Atlantic Navigator kom í føroyska flotan, fer skipið av aftur landinum. Tá svartkjaftatíðin er liðug í juli-august í ár, gevst Atlantic Navigator í Føroyum. Hetta boðaði partafelagið Næraberg frá í einum tíðindaskrivi í morgum og sigur samstundis, at øll starvsfólkini umborð á skipinum tí eru uppsøgd frá 1. august.

- Tað er keðiligt at koma við uppsøgnum, men komandi mánaðirnar vilja vit meta um, hvussu felagið á besta hátt kann brúka fiskiloyvini og skapa nýt virksemi, sigur stjórin í p/f Næraberg, Hanus Hansen.

Avgerðin er tikin, eftir at leiðslan og eigararnir av p/f Næraberg, sum eigur skipið, hava viðgjørt framtíðarvánirnar hjá skipinum og felagnum. Ein tann stórsta orsøkin til avgerðina »er tann ótryggleiki sum seinastu tíðina er komin fram í sambandi við fiskarílógirnar og treytirnar fyri projektinum í hesum sambandi« úttalar felagið.

Spurdur um, hvat tað er hann leggur í ótryggleikar og fiskarilógir, sigur Hanus Hansen:

- Tað er alt rumblið seinasta heyst um manningarlønir og streykur, sum gjørdi, at lønirnar skuldu upp. Harafturat fáa vit at vita, at lógin fyri útlendskan eigaraskap skal skerpast frá 33 prosentum og møguliga niður í 25 prosent. Ein onnur orsøk er antitrustlógin, ið varð viðtikin undan jólum, har eitt reiðarí ikki má eiga meiri enn 20 prosent av einum fiskaslagi. Hetta kann koma at raka skipið seinni. Og so at fiskiloyvini skulu inndragast eftir 10 árum, sigur Hanus Hansen.

Atlantic Navigator verður nú umbygdur til at fiska Krill fyri Aker BioMarine. Felagið útviklar og framleiðir og marknaðarførir Omega 3-baseraða framleiðslu frá krill, ið millum annað umfatar matolju.

Aker BioMarine er í ferð við at byggja upp eitt altjóða leiðandi maritimt felag, sum hevur serkunnað seg innan veitingar av háviréisvørum við at gagnnýta mest møguligt virðisketuna frá fiskiskapi til kunda, stendur at enda í tíðindaskrivinum frá p/f Nærabergi.



*Tá Atlantic Navigator verður tikin úr føroyskari vinnu og setir kós suður aftur ímóti Íshavinum missa eini 200 føroyingar arbeiðið*

*Savnsmynd*

### Rakstur gevur avlop

At geva politisku skipanini skuldina, er tað ikki bara ein umbering fyri at taka skipið úr vinnu í Føroyum og flyta tað til Suðurpólin, tí útlendsku eigararnir hava brúk fyri tí har júst nú?

- Nei, tað er tað ikki, men tann verkætlanin er sjálvandi við til at framskunda avviklingina í Føroyum. Tú skal minnast til, at tað eru brúktar tíggjutals milljónir at fáa skipið av Suðurpólinum í síni tíð, umbyggja tað í Noregi og seta tað í vinnu í Føroyum fyri síðani at fara avstað aftur við tí. Slíkt ger eitt felag bara ikki uttan víðari, sigur Hanus Hansen.

Reiðarin á Nærabergi sigur seg vera sera harman um, at søgan um Atlantic Navigator í føroyskari vinnu endar á hendan hátt.

- Vit brúktu fimm og eitt hálvt ár upp á Næraberg, har tað gekst sera striltið at fáa tað at koyra. Síðani fingu vit Atlantic Navigator, og eftir ávísar trupulleikar riggar tað væl nú, og tí er tað sera harmiligt. Men umstøðurnar at virka undir í Føroyum eru og verða broyttar so nógv til tað verra, at útlendsku eigararnir hava mist tolið, sigur Hanus Hansen.

Reiðarin vísir á, at tað hevur ongantíð gingið betri enn nú, tí raksturin er farin at geva avlop.

J.F.K. og Norðoyagrunnurin, sum eiga 67 prosent av felagnum, og partaeigarin Aker BioMarine, sum eigur 33 prosent, vilja saman halda áfram við virkseminum í p/f Nærabergi.

Hanus Hansen sigur, at møguliga kemur eitt annað skip sum avloysari fyri Atlantic Navigator.

# Kalsø: Vánalig umbering fyri at gevast

**Landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum heldur lítið um umberingina hjá reiðarínum Nærabergi, um at geva politisku myndugleikunum høvuðsábygdina fyri, at Atlantic Navigator nú gevst í Føroyum**

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*



*– Tað má vera tí, at tað er áhugverdari at seta Atlantic Navigator inn aðrastaðni, at reiðaríið gevst í Føroyum, heldur landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø*

*Savnsmynd*

Umstøðurnar at virka í Føroyum eru ikki versnaðar, heldur Bjørn Kalsø, og skilir tí als ikki reiðaríið á Atlantic Navigator, sum leggur høvuðsábyrgdina fyri avgerðina um at gevast á teir polisku myndugleikarnar.

– Hetta má vera tí, at tað er betri onkra aðrastaðni. Annað kann tað ikki vera, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum.

Bjørn Kalsø vísir á, at nógv av tí, sum Hanus Hansen, reiðari á Nærabergi, nevnir, als ikki er liðugt viðgjørt í tinginum.

– Eg veit heldur ikki, hvar hann hevur tað frá, at útlendski eigaraskapurin skal minkast úr 33 prosentum niður í 25 prosent. Tað kemur ikki frá okkum. Og hetta at lata fiskiloyvini koyra í 10 ár, merkir als ikki, at reiðaríini missa fiskiloyvini. Onki er til hindurs fyri, at loyvini verða longd. Og tá vit tosa um 20 prosent av einum ávísum fiskaslagi, so verður hetta bert galdandi fyri tey skip, sum koma inn í flotan. Markið upp á 30 prosent fyri verandi skip verður ikki broytt, sigur Bjørn Kalsø.

Landsstýrismaðurin sigur seg hava fylgt væl við í verkætlanini hjá Nærabergi og vísir á, at Atlantic Navigator hevur kunnað fiskað alt tað, skipið hevur verið ment.

- Eg dugi ikki at síggja annað enn tað, at hetta má vera ein strategisk avgerð hjá reiðarínum, tí fólkini aftanfyri meta tað vera meiri áhugavert at seta skipið í vinnu aðrastaðni. Tí er tað skeivt at leggja eftir okkum og geva okkum skuldina, sigur Bjørn Kalsø.

Hann undirstrikar, at ætlanin við at broyta fiskilóggávuna als ikki er at gera støðuna ótryggari fyri fiskivinnuna.

–Vinnan hevur framvegis góðar karmar at virka undir, og teir fara ikki at versna, stendur tað til mín, lovar Bjørn Kalsø.